Landsliðið fer í luftina

Hálvt annað hundrað føroyingar fara at fylgja við á staðnum, tá landsliðið leygardagin fer at spæla í Luksemburg

LANDSDYSTUR
Jóannes Hansen

Í dag klokkan ellivu fer fótbóltslandsliðið úr Vágum. Málið er HM undankappingardystirnir, sum eru á skránni í Luksemburg leygardagin og í Moskva mikudagin i komandi viku.

Tað man hava verið ógvuliga sjáldan, at tað er komið soleiðis fyri, at allir spælararnir, sum Allan Simonsen í fyrstu atløgu hevur tikið út, hava verið við í ferðalagnum. Tað vanliga plagar at vera, at ein ella fleiri hava kent seg noyddar at melda avboð, tí teir hava verið skaddir. Soleiðis er ikki hesa ferð.

Metmaðurin á landsliðnum er ikki við á ferðini, men síðani hópurin varð úttikin, hevur landsliðsvenjarin einki avboð fingið.

Undan úttøkuni var tað greitt, at metmaðurin á landsliðnum Allan Mørkøre og liðformaðurin Jens Kristian Hansen ikki vóru tøkir. Allan Mørkøre varð skaddur á venjingarleguni hjá landsliðnum í Spania, og Jens Kristian Hansen er ikki heilt komin fyri seg eftir skaðan, sm plágaði hann stóran part av kappingarárinum í fjør.

Teir átjan spælararnir í ferðalagnum eru Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen, B68, Rógvi Jacobsen og Jóhannis Joensen, HB, Christian Høgni Jacobsen og Jens Martin Knudsen, NSÍ, Jákup á Borg, Pól Thorsteinsson og John Petersen, B36, Uni Arge, Akranes, Sámal Joensen, GÍ, Jákup Mikkelsen, Herfølge, Johan B. Hansen, OB, Julian Johnsson, og Kurt Mørkøre, Sogndal IL, Óli Johannesen, Hvidovre IF og Todi Jónsson, FCK.

Fleiri av spælarunum hava í síðstu viku skift felag. Tað snýr seg um Rógva Jacobsen, sum er fluttur úr KÍ og til HB, John Petersen og Pól Thorsteinsson, sum eru fluttir til B36 úr ávikavíst Leiftri og Vali, og Sámal Joensen, sum er fluttur úr Leiftri og til GÍ.

Fleiri fylgja við

Umframt landsliðsferðalagið eru fleiri føroyingar í ferðalagnum til Luksemburg.

Umframt teir 18 spælararnar eru átta fólk knýtt at landsliðnum: Allan Simonsen, landsliðsvenjari, Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari, Jens Pauli Marstein, lækni, Álvur Hansen, fysioterapeutur og Birgir og Sigurd Hansen, sum eru ognarrøklar. Ferðaleiðarar eru Jens Erik Magnussen og Mortan Poulsen.

Tað er ikki til hvønn útidyst og heldur ikki á hvørjum ári, at FSF-bossurin og FSF-aðalskrivarin eru til landsdyst á útivølli. Men leygardagin verða Torleif Sigurðsson og Ísak Mikladal í Luksemburg. Teri skulu til UEFA-fund í Sveis hósmorgunin, og haðani fara teir til Luksembuirg áðrenn teir fara heim aftur til Føroyar.

Atlantsflog flýgur annars 75 áskoðarar til dystin, og einir 45 áskoðarar fara við bussi úr Keypmannahavn. Harafturat ferðast umleiðs 30 onnur úr Keypmannahavn til Luksemburg vbið bili ella toki at hyggja eftir dystinum.

Tá landsliðið fer til Moskva úr Luksemburg, verður ferðalagið minni. Tá verða ikki nógv onnur enn fjølmiðlarnir við á ferðini. Fyri Sosialin eru Jákup Mørk og Álvur Haraldsen við á ferðini, og teimum fara vit fyrstu ferð at frætta frá í fríggjadagsblaðnum.

Eysturoyingar tíma best at spæla fótbólt

Teir eiga seks av teimum tíggju liðunum, sum ætla sær at taka lut í landskappingini í unglingadeildini í ár

LANDSKAPPING
Jóannes Hansen

Dreingir í 15–19 ára aldri í Eysturoy eru meiri hugaðir at taka lut í fótbóltskappingini, enn javnaldrarnir hjá teimum aðra staðni í landinum. Hetta fæst burturúr við at lesa yvirlitið yvir luttøkuna í unglingadeildini í kappingarárinum, sum tað verður farið undir í komandi mánað.

Sambært yvirlitinum, so fara tíggju lið at kappast í unglingadeildini. Tey eru B36, Skáli, B68, NSÍ, EB/Streymur, KÍ, FS Vágar, ÍF, LÍF/GÍ og HB.

Nú fæst at síggja, hvussu tað verður, tá fyrsta umferðin í landskappingini verður á skránni 30. apríl. Undanfarin ár hevur tað aftur og aftur vístseg, at fleiri feløg, sum hava boðað frá luttøku í unglingadeildini, ikki halda seg til, tá dystirnir skulu spælast. Tey fáa ikki mannað lið.

Í fjør boðaðu tíggju lið frá luttøku, men tá farast skuldi undir kappingina, vóru trý teirra fallin frá. Tí varð gjørt av, at U–16 landsliðið skuldi luttaka. Harvið var talið á liðum í kappingini átta. Ímillum tey feløgini, sum í ár hava boðað frá luttøku, eru tvey, sum í fjør tóku teirra lið úr kappingini. Hesi eru B68 og EB/Streymur. Í fjør boðaði VB frá luttøku, men teir megnaðu ikki at manna lið. Í ár er VB ikki við í unglingakappingini.

Skáli var ikki við í kappingini í fjør. Í ár hava skálamenn, hvørs besta lið enn eina ferð skal royna at festa seg í 2. deild, boðað frá luttøku í unglingadeildini. Burtursæð frá Skála er tað bara eitt annað felag, sum ikki er umboðað í 1. deild, og sum heldur seg til í unglingadeildini. Hitt felagið er ÍF. Feløgini í 1. deild, sum ikki hava lið í unglingadeildini, eru B71 og VB.

Grammir eysuroyingar

Komandi vikurnar fæst at síggja, hvussu sambandið fer at verða ímillum tilmelding og luttøku, men um vit arbeiða út frá tilmeldingini, so er eingin ivi um, at tað eru unglingarnir í Eysturoy, sum eru nógv mest áhugaðir at taka lut í fótbóltskappingini.

Tá sammett verður út frá fólkagrundarlagnum, so hevði tað sjálvandi verið rættast at brúkt samlaða talið á teimum í unglingaaldri í ymsu økjunum sum útgangsstøði. Tey tølini hava vit ikki við hondina, tí ditta vit okkum at brúka fólkatalið í økjunum sum grundarlag. Tað er ikki heilt rætt, men kortini halda vit, at tad gevur eina góða ábending um, hvussu áhugin at spæla fótbólt er í ymsu økjunum.

Um vit meta út frá teimum, sum hava boðað frá luttøku, so er tað heilt greitt, at áhugin fyri fótbólti ímillum teir, sum hava unglingaaldur, er størstur í Eysturoy. Í Klaksvíkini og tí økinum, hagani tað er landfast úr Klaksvík, búgva umleið 5.500 fólk. Tey megna at manna eitt unglingalið. Í Havnar kommunu og í tí økinum, sum nátúrliga hongur saman við Havnini, búgva eini átjan túsund fólk. Tað økið mannar tvey unglingalið. Í Vágum búgva stívliga 2.500 fólk. Hagani kemur eitt unglingalið.

Í Eysturoy knappast fólkatalið um tíggju túsund. Hagani koma seks unglingalið. Tá skal leggjast afturat, at teir á Streymoyar síðuni í Sundalagnum eru partur av EB/Streymi. Men hagtølini siga, at unglingar í Eysturoy eru nógv dúgligari at taka lut í fótbóltinum, enn teir eru aðra staðni í landinum. Um luttøkutalið t. d. í Havnini sammett við fólkatalið skuldi verið tað sama, so høvdu ikki færri enn ellivu unglingalið úr høvuðsstaðnum tikið lut í landskappingini!

At áhugin fyri fótbólti í Eysturoy sambært luttøkutalið er størri, enn hann er aðra staðni, er ikki nýtt. Tað sæst t. d. aftur í umboðanini í bestu deildini. Av teimum tíggju feløgunum, sum eru umboðað í 1. deild, eru fýra úr Eysturoy. Fleiri ferðir hava tey verið fimm, og onkuntíð hava tey verið seks í talið.

Línan slitnaði ikki

Eftir dystin hjá AB mánakvøldið er Herfølge ikki verri fyri í botnstríðnum, enn teir vóru undan dystinum

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Felagið hjá Jákupi Mikkelsen liggur tungt í sjónum. Tað greiddu vit frá í blaðnum í gjár. Tá søgdu vit eisini, at mánakvøldið var ein dystur á skránni, sum var áhugaverdur fyri støðuna hjá Herfølge, og at vit skuldu venda aftur til henda dystin í blaðnum í dag.

Mánakvøldið var AB á útivølli og spældi ímóti FC Midtjyllandi. Herfølge er undir niðurflytingarstrikuni, og AB er niðasta liðið omanfyri strikuna. Ivaleyst fylgdu Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir væl við á TV3+ rásini, og úrslitið mundi smakka teimum væl. FC Midtjylland vann 4–2, og harvið er munurin ímillum AB og Herfølge framvegis tvey stig. AB hevur 19 stig, og Herfølge hevur 17 stig.

Tá 21. umfarið í superliguni verður á skránni 1. apríl fara hesi bæði liðini at dystast í Gladsaxe, har heimavøllurin hjá AB er. Fyri Herfølge verður tað so at siga lívs neyðugt at vinna ta ferðina.

Um vit skulu meta út frá avrikinum hjá AB mánakvøldið, so eigur tað ikki at vera púra ómøguligt hjá Jákupi Mikkelsen og teimum at vinna. AB spældi ikki væl, og tað var ikki fyrrenn síðstu minuttirnar, at teir fingu pyntað um úrslitið.

Tá 2. hálvleikur var hálvrunnin bendi alt á, at FCM, sum við sigrinum við stigum er á sætta plássi – eitt stig aftanfyri FCK og Viborg – fór at vinna stórsigur. Teir vóru frammanfyri 4–0, men so tóku teir sær av løttum. AB skoraði síðstu løtuna tvey mál, og teir høvdu møguleikar at skora okkurt málið afturat. Um teir høvdu skorað eitt mál afturat, tá tað restaðu einir fimm minuttir, so ber kanska til at ímynda sær, at órógvið hjá FCM hevði verið so stórt, at úrslitið hevði verið javnleikur. Men hetta er – so plagdi maðurin at taka til – hypotetiskt snakk!

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Silkeborg	20	10	-	8	-	2	32	24	8	38
2	Brøndby	20	11	-	3	-	6	50	26	24	36
3	Lyngby	20	11	-	2	-	7	33	33	0	35
4	FCK	20	9	-	7	-	4	33	18	15	34
5	Viborg	20	10	-	4	-	6	35	21	14	34
6	FCM	20	9	-	6	-	5	36	30	6	33
7	OB	20	9	-	2	-	9	32	26	6	29
8	AaB	20	7	-	6	-	7	29	31	-2	27
9	AGF	20	7	-	2	-	11	28	38	-10	23
10	AB	20	4	-	7	-	9	28	33	-5	19
11	Herfølge	20	4	-	5	-	11	23	42	-19	17
12	Haderslev	20	1	-	4	-	15	19	56	-37	7

VIÐMERKINGAR

Steinbjørn og danskir pengar

Dan R. Petersen
Javnaðarmaður

Ein tann mest fordummandi pennurin her á landi er tann hjá Steinbjørn B. Jacobsen. Við sínum sermerkta støplandi og hjálparleysa skrivingarlag hevur hann fylt bløðini við banalitetum, síðani hann læt seg pensionera við danskari eftirlønn, sum annars bert tilfellur útbúnum fólkaskúlalærarum. Fáur man lesa, og ongin kommenterar hann. Eg skal tó gera eitt undantak í hesum føri, tí summi skilja onki, uttan tey fáa eitt skot av grovum høgli í afturpartin.

Í seinastu viku hevði hann ein av sínum høpisleysu stubbum í bløðunum undir heitinum "Greipan hjá Nyrup". Har viðger hann millum annað lønirnar hjá okkara fólkatingslimum, sum hann setur til 700,000 kr árliga. Fáur lýgur meira enn helvtina.

Eg havi fyrr víst á, hvussu púrgjørd okkara sjálvbestaltaða mentaelita (uha uha) er fyri sjálvsrannsakan. Hví viðger hesin danski pensionisturin danskar lønir, sum aðrir fáa? Sambært sáttmála millum lærarafelagið og fíggjarmálastýrið fær Steinbjørn B. Jacobsen 16.049 kr um mánaðin, sum hann sjálvur hevur søkt og biðið um. Sambært hvítubók rindar tann danski statskassin 80 % av lærarapensiónunum, so danir føða og klæða hesa fullveldishetjuna. Teir eiga hann við húð og hár. Men danskir pengar lukta ikki, og allarminst hjá tjóðskaparhøvundum. Nógvir súgva danskar grunnar og fondar sum nýfødingurin mammuna.

Tjóðveldisflokkurin hevur einaferð átt fólkatingssessin. Tað var Erlendur Patursson. Mundi hann lata seg velja fyri ta donsku lønina skyld? Mundu Karsten Hoydal fullveldisabbi, Zakarias Vang og Finnbogi Ísakson fara eftir tí donsku lønini, tá teir stilláðu upp einsamallir? Forrestin, var tað ikki júst undir einum donskum valstríði, at Zakaris fekk teir báðar, formannin í tjóðveldiflokkinum og blaðstjóran á 14. September í geglið? Intrigur í tjóðveldisflokkinum, hvussu hon skal reagera uppá uppskot landsstýrisins. Óivað vil hon fegin vísa sín góða vilja við at finna eina realitetsbroyting í mun til fyrra uppskotið, men tað verður vist ein leiting til fánýtis. Nú skal bæði Føroyanevndin hoyrast og eitt orðaskifti í fólkatinginum fyriskipast, áðrenn svarið verður givið. Hetta má helst tulkast sum, at nú kann væntast tað endaliga svarið til hesa samgonguna, sum framvegis tvíheldur um at fremja eina miðvísa fullveldisætlan. Og til tað hevur danska stjórnin bert havt eittans svar.

Undir orðaskiftinum í løgtinginum gjørdi Javnaðarflokkurin sum ikki einaferð aftur greitt, at hann er vælviljaður fyri fullveldisætlanini.

Um føroyski veljarin er samdur við fullveldisfólkini í, at núverandi fiskiríkidømið fer at halda sær óbroytt í framtíðini, at teir ovurhonds høgu fiskaprísirnir fara at halda sær í framtíðini, at rentustigið framvegis fer at halda sær so lágt sum nú, og at Føroyar fara at varðveita ein sjálvberandi búskap einans byggjandi á fisk og fiskaúrdráttir, tí enn eru at kalla um hoyra sanniliga ikki bara nútíðini til.

Hetta glepsið er ikki ætlað at raka allar høvundar, men bert teir tjóðskaparligu, sum hava tikið sær monopol upp á evnini at skapa og kanska ongi evnir hava. Heldur ikki er hetta ætlað at raka tann vanliga læraran, sum letur seg pensionera 60-ára gamlan. Hetta er beinleiðis ætlað einum skammleysum persóni, ið heglar niður á eitt system, ið føðir og klæðir hann. Ger tú skálkinum gott…

Munurin á teimum føroysku fólkatingslimunum og Steinbjørn B. Jacobsen er stórur. Teir fyrru fáa eina danska løn fyri eitt arbeiði, veljarin hevur sett teir til. Tann seinni fær eina danska pensión, hann sjálvur hevur biðið um. Men sjálvsrannsakan er ikki júst ein eginleiki, Steinbjørnsa kalibur er mest fongt við.

Ríða á einum hesti

Eilif Samuelsen

Tað má viðgangast, at hetta fullveldislandsstýrið stríðist fyri síni søk. Teir hava sum kunnugt sett sær fyri at gera Føroyar til eitt fullveldisríki loyst frá Danmørk, og tað skal henda í hesum valskeiðinum fyri ein og hvønn prís. Teir vita sum er, at ein slíkan møguleika fáa teir ikki aftur í bræði, tí teir hava ikki longur meirlutan av fólkinum aftan fyri seg. Tað høvdu teir fyri trimum árum síðani, og tann farni veruleikin má og skal troytast til seinasta blóðsdropa. Sjálvt um teir í samráðingunum hava verið noyddir at rýma av einum skansanum fyri og øðrum eftir, so eru teir nú við tí at seinasta neyðsemjuuppskotinum um sjálvstýri Føroya fólks í effinett somu støðu, sum teir alla tíðina hava verið, nevniliga, at málið er fullveldið, loysingin. Allar burturforklæringar um, at nú liggur loysnin innan fyri heimastýriskarmin, er at kasta torvmold í eyguni á fólki. Men nú duga fólk á at skyna, hvat er politiskar fupproyndir, og hvat er veruleiki.

Danska stjórnin hevur sagt greitt og týðuliga, at ein skipað gongd móti fullveldi førir við sær, at ríkisveitingin verður avviklað eftir fýra árum. Hetta er greið og konsekvent tala, skiljandi fyri ein og hvønn. Seinasta útspælið hjá landsstýrinum er í royndog veru eingin broyting í mun til tað undanfarna, sum ætlað var at senda til fólkaatkvøðu, og sum Fólkaflokkurin ikki kundi taka undir við. Hetta hava teir eisini sjálvir váttað. Tí mugu teir rokna við, at svarið frá stjórnini verður tað sama sum frammanundan: fýra ára skiftistíð.

Í løtuni grundar danska stjórnin um, hvussu hon skal reagera uppá uppskot landsstýrisins. Óivað vil hon fegin vísa sín góða vilja við at finna eina realitetsbroyting í mun til fyrra uppskotið, men tað verður vist ein leiting til fánýtis. Nú skal bæði Føroyanevndin hoyrast og eitt orðaskifti í fólkatinginum fyriskipast, áðrenn svarið verður givið. Hetta má helst tulkast sum, at nú kann væntast tað endaliga svarið til hesa samgonguna, sum framvegis tvíheldur um at fremja eina miðvísa fullveldisætlan. Og til tað hevur danska stjórnin bert havt eittans svar.

Undir orðaskiftinum í løgtinginum gjørdi Javnaðarflokkurin sum ikki einaferð aftur greitt, at hann er vælviljaður fyri fullveldisætlanini.

Um føroyski veljarin er samdur við fullveldisfólkini í, at núverandi fiskiríkidømið fer at halda sær óbroytt í framtíðini, at teir ovurhonds høgu fiskaprísirnir fara at halda sær í framtíðini, at rentustigið framvegis fer at halda sær so lágt sum nú, og at Føroyar fara at varðveita ein sjálvberandi búskap einans byggjandi á fisk og fiskaúrdráttir, tí enn eru at kalla ongar alternativar vinnur av nøkrum týdningi komnar fram, so er tað skiljandi, at fólk taka undir við fullveldinum.

Men tað munnu vera mong, ið eins og sambandsfólk halda, at føroyska samfelagið hóast mikla framgongd ikki er nóg væl fyribúgvið til nakað fullveldi, og at tað er ov hættisligt uttan fyrilit at kasta tjóðina út í óvissuna, einans við at ynskja, at alt fer at gangast á besta hátt, og at fáa vit bert fullveldi, so blómar og veksur alt. Tað er jú tað, ið landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum hevur fyrigyklað fólki í ramasta álvara.

Sambandsflokkurin hevur meldað greitt út, at hann framvegis fer at virka fyri, at Føroyar verða innan fyri ríkisfelagsskapin, men at vit hava eitt uppskot um eina nýskipan av ríkisrættarligu viðurskiftunum. Eina skipan, sum danska stjórnin ikki hevði havt torført við at góðtikið, men sum hevði verið til størri frama fyri føroyingar enn fullveldisætlanin. Vit gera ikki sum ávísir aðrir flokkar, men vit ríða á einum hesti.

Náttúruvísindadeildin og Jarðfrøðisavnið gera samstarvsavtalu

Náttúruvísindadeildin og Jarðfrøðisavnið hava í dag undirskrivað samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at menna fakligan førleika í Føroyum innan jarðfrøði, jarðalisfrøði og kolvetnisverkfrøði. Samstarvið fer at fevna um gransking, universitetsútbúgvingar og savnsvirksemi. Við samstarvsavtaluni vænta partarnir at fáa styrkt um grundarlagið fyri at byggja upp dygdargóðan heimligan kunnleika og førleika innan hesi krevjandi og viðkomandi fakøki.

Jarðfrøðisavnið nýggja reglugerð

Jarðfrøðisavnið varð í fjør skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Oljumálastýrinum. Í nýggju reglugerðini fyri stovnin stendur m.a., at Jarðfrøðisavnið "samstarvar við Fróðskaparsetur Føroya um undirsíðingar- og granskingaruppgávur á Náttúruvísindadeildini…." Jarðfrøðisavnið hevur aðrar formligar samstarvsavtalur við Føroya Náttúrugripasavn um jarðfrøðiligar framsýningar og við Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse um jarðfrøðiligar kanningar og gransking v.m.

Samstarv um gransking

Til tess at fremja endamálssetningin í verki fara partarnir at kunna hvønn annan um granskingarverkætlanir og kanningar, ið eru í umbúna, soleiðis at bestu fortreytir verða fyri synergi. Ein týðandi partur í samstarvinum er, at partarnir kunnu nýta dátutilfar hjá hvør øðrum í granskingarverkætlanum v.m. Náttúruvísindadeildin hevur í seinastuni lagt dent á at menna phdgransking innan jarðfrøði, jarðalisfrøði og kolvetnisverkfrøði. Hetta verður mett at verða ein týðandi liður í menningini av føroyskum førleika á hægri stigi á fakøkjunum, ið samstarvað fer at verða um.

Universitetsútbúgvingar

Partarnir fara eisini at samstarva um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya innan jarðfrøði, jarðalisfrøði og kolvetnisverkfrøði. Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum eru m.a. útbúgvingar í kolvetnisverkfrøði og jarðalisfrøði. Tað verður væntandi vaksandi tørvur á fólki í Føroyum við slíkum útbúgvingum, m.a. í oljuvinnuni og í fyrisiting í sambandi við hana. Partarnir lata í hesum sambandi tøkt kanningartilfar og dátur til seruppgávur hjá studentunum.

Savnsvirksemi og ráðgeving

Í reglugerðini fyri Jarðfrøðisavnið stendur, at stovnurin "hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum." Í tráð við hetta stendur í samstarvsavtaluni millum Náttúruvísindadeildina og Jarðfrøðisavnið, at partarnir virka sum serfrøðingar í sambandi við m.a. kunnandi virksemi á Jarðfrøðisavninum (framsýningar v.m.) og ráðgevandi verkætlanir.

Náttúruvísindadeildin og Jarðfrøðisavnið, 19. mars 2001